## Nýggir hátalarar í Vágstún

**Klaksvík:** Á býráðsfundi í Klaksvík týskvøldið samtykti býráðið, at eitt nýtt hátala-rakerv skal setast upp í Vágstúni.

Vágstún er ofta karmur um tiltøk og hátíðarløtur av ymsum slagi í Klaksvík, og saknur hevur verið í einum hátalarakervi, tí ofta hevur verið torført hjá fólki at hoyrt alt, sum gongur fyri seg.

Hetta sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, fer at broytast við tí nýggja kervinum.

– Hetta verður eitt varðandi kerv. Sum er verður riggað til hvørjaferð okkurt skal verða í Vágstúni, men tað slepst so undan við nýggja kervinum. Tað kemur at standa har allatíðina, sigur hann.

Nýggja kervið kemur í kjalarvørrinum av broytingunum í økinum við Vágstún, síðani rundkoyringin kom, og heldur borgarstjórin, at tiltøk í Vágstúni framyvir fara at eydnast nógv betur framyvir við betraðu ljóðgóðskuni.

-sae-

## Vøksturin er steðgaður

Lønarútgjaldingar vísa nú týðiliga eina stagnatión í búskapinum. Samlaðu lønarútgjalding-arnar í 2003 vóru góðar 6 mia. kr., og tað er bara 35,7 mió kr meira enn fyri 2002. Tað svarar til ein vøkstur uppá 0,6%. Verða lønarhækkingar í 2003 trektar frá er vøksturin í virkseminum negativur. Hetta skrivar heimasíðan hjá Vinnuhúsinum.



## Læknin ovfarin av gestablídni

Læknin – altso tann ordligi læknin, hin í sjónvarpinum – var herfyri á ferð í Føroyum. Peter Qvortrup Geisling hevði fyrilestrar í Havn og á Viðareiði, og áhugin var stórur. Læknin var hugtikin av Føroyum og serliga føroyska gestablídninum.

Hann hevur fastan teig í danska vikublaðnum Ude & Hjemme, og har skrivar hann um upplivingar sínar í Føroyum.

– Ein eldri kvinna og dóttir hennara høvdu frætt, at eg savni frímerki, so tey bjóðaðu mær til kaffi. Vit fingu eitt hugnaligt prát, og eg fekk fimm gomul postkort úr Føroyum, greiðir læknin frá.

Ein hýruvognsførari, sum læknin koyrdi við í Havn, hevði fingið frænir av, at hann skuldi hava fyrilestur, samstundis sum danska røðin Krøniken var í sjónvarpinum.

– Tá eg skuldi aftur til Danmarkar, kom eitt starvsfólk á flogvøllinum til mín við einum brævbjálva. Í honum lá ein heilsan frá hýruvognsføraranum. Hann hevði tikið Krøniken upp á video til mín.

ek

## Gunnar á Eclipse

Gunnar Mikkelsen, sum um vikuskiftið fer at hava framførslur í Føroyum, skal fríggjakvøldið syngja á Eclipse í Havn.

Ætlanin var annars, at hann skuldi vera á Platform, men meira fólk passar inn í Eclipse, og tí verður framførslan hjá honum har. Leygarkvøldið syngur hann í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

Gunnar Mikkelsen vann í fjør sangkappingina Stjørna í eitt kvøld, sum Danmarks Radio skipaði fyri.

ek

## Fyrsta upplagið næstan útselt

Tveir dagar fyri jól kom Betesdakórið í Klaksvík út við fløgu. Útgávan er væl dámd, og nú er fyrsta upplagið av útgávuni við at vera útselt. Á fløguni eru 21 sangir – meiri og minni kendir, og umframt acapella sang er eisini fylgispæl við orgli, klaveri, bassi, hornum, violin og sello.

Eini 60 sangarar syngja við Betesdakórinum, sum gjøgnum árini hevur ferðast nógv heima og burturi.

ek

# Brandur Enni kann syngja seg inn í hitan

**Brandur Enni hevur fingið gyltan møguleika at gera vart við seg í donsku undirhaldsvinnuni. Sunnukvøldið skal hann syngja í Falkoner Centrinum í Keypmannahavn**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Føroyski sangarin Brandur Enni skal um vikuskiftið syngja saman við eini rúgvu av kendum nøvnum í donsku tónleikavinnuni.

Men tað, sum kanska er meira spennandi, er, at millum teir 2200 áhoyrararnar verða fólk, sum fáast við undirhaldsvinnuna í Danmark – fjølmiðlafólk, bookingfeløg, hotell, fyritøkur, kommunir og onnur.

Brandur skal syngja sangin »Boys from America«, og saman við honum á pallinum verða eisini dansigentur frá dansiskúlanum hjá Freddie Petersen.

### Kend nøvn eru við

Millum hinar sangararnar, sum verða á pallinum í Falkoner Centrinum hetta kvøldið, eru Amin Jensen, Jette Torp, Søren Pilmark, Peter Mygind, Kim Sjøgren og onnur. Eisini eru fólk úr Svøríki við til tiltakið.

Jens Krøyer, ið nógv munnu kenna sum klaverspælara frá sendingini »Hit med sangen« stendur fyri tónleikaliga partinum, og kendi sjónleikarin Flemming Jensen verður frásøgumaður.

### Iris upp í leikin

Tað er Iris í Klaksvík, sum saman danska felagnum Eugen Taimer Entertainment er farið undir at føra Brand frammi uttanlands.

Frá IRIS í Klaksvík verður sagt, at teir krossa fingrar fyri Brandi, og teir takka sínum stuðlum til tiltaki – Postverk Føroya, Atlantic Airways og Føroya Banka.



*Brandur Enni, sum her sæst á palli í Klaksvík fyrr í ár, skal sunnukvøldið syngja á eini heilt serligari konsert í Keypmannahavn*

# Eilif týtt ein av kirkjufedrunum til føroyskt

**Eilif Samuelsen hevur týtt bókina »Játtanir Augustinusar«, sum er um ein av látínsku kirkjufedrunum**

BÓKAÚTGÁVA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Um hálvan mars kemur út bókin »Játtanir Augustinusar«, sum er um ein av latínsku kirkjufedrunum, sum á sín serliga hátt setti dám á gudfrøði og kirkjulív.

Tað er Eilif Sameulsen, lærari og fyrrverandi løgtings- og landsstýrismaður, sum hevur týtt bókina.

– Fyri fimmti árum síðani hoyrdi eg um Augustinus á læraraskúlanum og keypti eina bók við heitinum »Augustinus Bekendelser«, greiðir Eilif Samuelsen frá.

Hetta var ein stytt útgáva av teimum fyrstu 10 bókunum av »Confessines«.

– Nú ið eg fekk meira ræði á míni tíð, fór eg undir at týða ta bókina, sigur Eilif Samuelsen.

Aurelius Augustinus hevur havt alstjóran týdning fyri vesturevropiska mentanarliga siðaarvin.

Játtanir Augustinusar er ein av teimum mest týðandi og mest nýskapandi verkunum í latínsku bókmentum. Bókin er skrivað, tá ið høvundurin var fyrst í fýratiárunum í teim seinastu árunum av fjórðu øld e. Kr. og í teimum fyrstu árunum, hann var biskupur. Hon endurspeglar lív hansara og virksemið við at endurminnast og tulka eina lívsgongd.

– Henda útgávan, sum er tað fyrsta av Augustinusi, ið útgivið er á føroyskum, hevur »Confessiones« í heilum líki, eisini tær tríggjar setinastu heimspekiligu bøkurnar um tíðina og skapanarsøguna, sum sjáldan verða tiknar við, greiðir Eilif Samuelsen frá.

Av tí at Eilif Samuelsen ikki var so kønur í látíni, hevur hann nýtt rúma tíð at bøta um látínið. »confessiones« er skrivað á látíni – men hevur hann nýtt enskar og norðurlendskar bókmentir sum stuðul.





*Eilif Samuelsen við bókini um Augustinus, sum var ein av látínsku kirkjufedrunum. Bókin kemur út hálvan mars*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



# Klaksvíkar kommuna má taka lán

**Í sambandi við, at norðoyartunnilin nú av álvara er farin í gongd, er neyðugt hjá Klaksvíkar kommunu at skunda undir nakrar av íløgunum, sum skulu gerast fyri at fyr-i-reika Klaksvík upp á fasta sambandið. Hetta fer at hava lántøku við sær**

LÁNTØKA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** – Fyri at kunna fíggja íløgur komandi trý árini, kann tað fara at verða neyðugt at hækka lánið hjá kommununi, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri.

Hann sigur, at íløgurnar, sum tosað verður um, umfata serliga miðbýarætlanina, liðugtgerð av ringvegnum og økið við bátahylin uppi í Borðoyavík. Aðrar íløgur umframt.

Viðvíkjandi fígging og lántøku í hesum sambandinum, sigur Steinbjørn, at tað veldst nógv um, nær tær ymsu upphæddirnar fella.

Tær fyrstu átta milliónirnar fella í ár, og borgarstjórin væntar ikki, at tað fer at verða neyðugt at taka lán til tær. Men komandi ár og í 2006 verða íløgur fyri ávíkavist 11 og 10 milliónir, og tað er til hesar íløgurnar, at lán kunnu fara at verða neyðug.

– Tørvurin á hesum íløgunum er avbera stórur, og tað er sjálvandi í eitt sindur av døpurhuga, at farið verður inn á tosið um at taka lán, men kortini haldi eg, at tað er ikki vandi á ferð, so longi sum skuldin er niðan fyri eina álíkning, sigur borgarstjórin.

Skuldin hjá Klaksvíkar kommunu í dag liggur um tær 80 milliónirnar, men við árslok verður hon komin niður á 65.

– Vit hava tvinnar møguleikar í hesum sam-bandinum. Antin at hækka skattaprosentið ella taka lán, sigur Steinbjørn, sum hellir meira til at taka lán, sum hann ikki metir vera ábyrgdarleyst, tá skuldin er komin so langt niður.

– Kommunan hevur eina inntøku upp á 110 milliónir, og skuldin við árslok verður um 65, og hartil eru lánini munandi bíligari í dag enn í áttatiárunum við lága rentustøðinum, sum er í dag, sigur Steinbjørn Jacobsen.



*Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík*





*Poul Færø er ein av innbjóðarunum til fundarrøðina á Svangaskarði um vikuskiftið*

# Poul Færø vitjar á Svangaskarði

**Umframt lokalar sangkreftir fara kvartett úr Klaksvík og Ebenezerkórið at syngja á Toftum í vikuskiftinum**

FUNDARRØÐ
*Tíðindaskriv*

Í vikuskiftinum verður ítróttarhúsið á Svangaskarði karmur um evangeliska fundarrøð á Toftum. Tað er Poul Færø, ið er búsitandi í Klaksvík, sum saman við øðrum er innbjóðari.

Poul Færø er ættaður av Toftum. Og hóast tað nú eru mong ár síðani, at hann flutti úr heimbygdini og til Klaksvíkar at búgva, so kennir Poul framvegis nógv fólk á Toftum, og hann er eisini kendur á Toftum. Ikki minst tí at hann so ofta vitjar, tá ið serstøk høvi eru, um tað so er í sambandi við jarðarferðir, føðingardagar ella brúdleyp.

Fleiri luttakarar eru í evangelisku møtirøðini, sum í vikuskiftinum verður á Svangaskarði. Umframt Poul Færø fer Jákup N. Olsen at tala. Teir báðir høvdu fyri stuttum møtirøð í Hermon í Norðdepli. Harumframt fer Øssur Berghamar at siga nøkur orð fríggjakvøldið. Susan og Øssur Berghamar, sum dagliga starvast í Kristnastovu í Keypmannahavn, hava verið heima í einar tvær vikur. Øssur hevur røtur á Toftum.

Fundirnir á Svangaskarði verða fríggjakvøldið og leygarkvøldið klokkan 20 og sunnukvøldið klokkan 18. Fríggjakvøldið verður sangluttøka úr Nebo á Toftum. Leygarkvøldið fer kvartett úr Betesda í Klaksvík at syngja, og sunnukvøldið verður sangkórið í Ebenezer á Svangaskarði. Harafturat fer Minibarnakórið í Nebo, sum tað verður nevnt, at syngja einar tveir sangir sunnukvøldið.

Samkoman í Nebo bjóðar øllum, sum koma til møtini hesi trý kvøldini, at steðga á og at fáa sær ein drekkamunn og at nýta høvið at heilsa uppá.

